Ótrúligt, men satt um »Dagblaðsins« menn.

»Dagblaðsins« handfaring av føroyskum máli er tiltikin — sum hin mest óføroyska.

Vit skilja tí, at blaðsins høvundar hava fingið hjartaillsku av øvundsjúku við at siggja P. M. Dams vökru lýsning av føroyska málinum og Føroyinganna varðveiting av tí. Ilt eygað tolir sum sagt einki gott at sjá.

Kortini! Okkum minnist ta ferðina, tá ið Th. Petersen niðri á bryggjuni á Tvøroyri segði soleiðis frá Jóanes bónda Patursyni:

»Tað segði Jóanes bóndi Patursson, at eingin maður hevði vart betri føroyskt mál og føroyska mentun enn tygum Dam»!

Hesa ásannan Jóanesar Patursonar og Thorstein Petersens í eini sannførisløtu teirra yvir fyri mótstøðumanninum er bygd uppá royndir í lívinum, á tingi og aðra staðni.

Er tað ikki meiri enn synd í «Dagblaðnum» at ríða so niðarlaga, at hetta verk P. M. Dams fyri føroyskum skal fáa tað til at spræna eitur.

«Dagblaðið» hevði gjört sær eina spekingartænastu, um tað fyri lesarum sínum vildu greitt hesar spurningar:

Hvör setti fram uppskotið um at eingin kennari skuldi kunna verða ásettur við hin føroyska fólkaskúlan uttan prógv í føroyskum?

Og hví vóru Jóanes bondi Patursson og hansara menn í fylking við sambandsmonnum at fella hetta uppskotið?

Hvör setti fram hitt fyrsta uppskotið um ein mentunnargrunn (viðvíkjandi høvundalön)?

Hvi vóru Jóanes bondi Patursson, Th. Petersen og teirra menn í fylkning við sambandsmonnum til at fella hetta uppskotið?

Hvör var tann, sum í 1931 setti fram uppskotið um, at okkara flag skuldi verða góðkent við lóg sum flagg Føroyinganna uttan fyri 3 milamarkið?

Hví fylktist Jóanes bóndi Patursson og hansara menn við sambandsmonnum til at vera ímóti at fremja hetta uppskotið?

Kundu hildið áfram við tílíkum spurningum út frá tí politiska bardagnum — men hesir eru ivaleysir til at lýsa stöðuna.



SGR. REKLAMA

RASMUS

Havi lisið merking tygara av vinarlagi mínum.

Men nær og hvar havi eg verið málvinur heldur enn alvinur?

Nær og hvar hevur mær búð fals undir fríðum skinni yvir fyri tygum?

Nær og hvar eri eg komin sum eiturormur í dúvuholu yvir fyri tygum?

Kvæði tygara ger mær ilt, Rasmus, tí tað hevur sett grómur í skaplyndið, eg havi ímyndað mær av tygum.

Mær var einans farandi í pennin eitt suff yvir í 14. September at síggja ta vannvirðandi misskenning av monnum, sum liggur í spurninginum: um teir menn, sum ikki eru samdir við loysingamenn um fólkaatkvøðuna sum endiliga avgerð fyri loysing, eru Føroyingar.

Eg undraði meg yvir, at tygum bygdi spurningin uppá falsumið, at meirlutin var fyri loysing, tí eg hevði aldri droymt um, at ein maður sum tygum kundi vera samdur við Erlend Patursson í at tveita burtur allar, sum fylgdu Th. Petersen í at siga nei, um teir hvørki vildu ganga við til sjórnaruppskotið ella taka loysing.

Nei-atkvøðurnar vóru ímóti loysing. Eingin skilamaður, sum hevur virðing fyri fólkaviljanum kann avsanna henda verunleika.

Atkvøðurnar fyri stjórnaruppskotinum vóru sjalvandi eisini ímóti loysing.

Eingin skúlanæmingurin kann fáa hesar atkvøðurnar til annað enn at liggja oman fyri 50%, og loysingaratkvøðurnar til undir 50%.

Bæði loysingin og stjórnaruppskotið vóru so statt feld av fólkaatkvøðuni 14. septembir.

At tygum Rasmus ikki vilja viðganga hetta er ein veikleiki. ið fær ein serliga sáran dám, tá ið 14. Septembir sigur tygum vera so stirdan í hesari villu, at tygum loyva tygum at spyrja, um vit eru Føroyingar, sum við at leggja nei-atkvøðurnar og atkvøðurnar fyri stjórnaruppskotinum saman skilja fólkaatkvøðuna sum beinavegin fellandi loysingaruppskotið.

Men hann, ið skilir mannsins veikleika uttan at missa eygað av mannsins vökru avreksverkum, er — uttan mun til grima miskenning — støðugt.

Mannsins alvinur.

Um summarið
fríðkar og prýðir
FÆRØSIT máling.
Um veturin
verjir og sparir
FÆRØSIT máling.
s g.r. reklama

Føroya Bjór
Øl- og Mineralvatnsvirki
Máltráð nr. 4
FØROYA PILSNAR
EKTA MALTØL
Citrón sodavatn
Appelsin limonada
Hindber limonada
Jørðber limonada
Vanillie limonada
Appolinaris
Øl og mineralvatn verður bert sent til teir kundar, ið senda kassar og fløskur aftur. **Sendið tómt góðs aftur!**
EINAR WAAG
Klakksvík.

Í VÁGSBOTNI FÆST:
Takpapp — Carbolinium — Black Warnish — Finsk Tjøra — Máling.
Allar stöddir av PENSLUM og TJØRUKUSTUM
BUMMULLSSNØRIR, 5, 7, 8 lbs.
Hampsnörir, 1½, 3½, 6 lbs.
P. f. Z. HEINESEN
Tlf. 83 & 240 . Tórshavn

Grót og skervur.
Øll, ið vilja keypa skerv ella grót eiga at venda sær til kommunukantórið.
Grót og skervur megu verða goldin fyrst, áðrenn tey verða heimtað.
Bilstjórar verða ámintir, at teir ikki kunnu heimta grót ella skerv uttan við einum limi av vegnevndini ella einum umboðsmanni fyri kommununa.
Fræðiar søknar kommuna

AKTIESELSKABET
FØROYA BANKI
HOVEDKONTOR THORSHAVN Stiftet 1906 AFDELING: TRANGISVAAG
Aktiekapital og Reserver ca. Kr. 2.000.000
Bankforretninger af enhver Art udføres.
Kontortid Kl. 11 – 3.
Lørdag 11 – 2.

TRYGGINGARSAMBANDIÐ
FØROYAR
Føroya Kríggstrygging .. telf. 372
Føroya Brunatrygging .. telf. 372
Føroya Sjóvátrygging ... telf. 372
Føroya Vanlukkutrygging telf. 221
Vit tryggja:
Bátar - skip - vørur - hús - innbúgv - ferðagoðs bilar o. a.
Føroyingar eiga at tryggja
í landsins egnu trygging –